# - Tepurt tap er ein sigur

Hetta sigur verjuleikarin hjá Andorra, Toni Lima, undan dystinum ímóti Onglandi í kvøld. – Um vit ikki tapa stórt, er tað ein sigur fyri okkum. Tað verður ein torfør uppgáva, men vit skulu berjast fyri ikki at lata ov nógv mál inn, sigur maðurin, sum er verjuskansin á liðnum hjá Andorra. Trýstið á enska landsliðið er størri enn nakrantíð undan dystinum í kvøld. Teir hava ikki vunnið í síðstu fimm dystunum, og tí er sigur eitt krav ímóti Andorra. Dysturin er fluttur úr Andorra, av tí at vøllurin bert rúmar 1299 áskoðarum. Hann verður í staðin leiktur á heimavøllinum hjá Espanyol, har pláss er fyri 40.000 áskoðarum.

# Rooney skorar ikki

Í Manchester United skora Wayne Rooney hópin av málum, men tað sær út til, at tað ikki er eins lætt at skora fyri enska landsliðið. 21 ára gamli Wayne Ronneu hevur ikki skorað fyri enska landsliðið í seinastu 15 dystunum, og sambært enskum miðlum komu Ronney og enski landsliðsvenjarin, Steve McLaren, upp at táttast eftir skuffandi javnleikin ímóti Ísrael leygardagin. Grundin var tann, at venjarin hevði sagt nøkur orð um Rooney og hansara skoritrupulleika, og hetta bleiv tikið illa upp hjá unga stjørnuskotinum.






*Føroyameistarin Hallur Joensen saman við nr. 2 Kristian Suna Høgnesen og nr. 3 Niels Nielsen.*

hann ein tjekk uppá 5000 kr., sum hann handaði formanninum í Klaksvíkar Billardfelag, Allan Larsen. –Tit hava gjørt eitt framúr gott arbeiði. Tit hava skapt virðing fyri Klaksvíkini og billardítróttini. Vit hava í dag hópin av ítróttargreinunum, alt frá billard til fótbólt. Tað er gott, at ítróttin spennir so víða og er so fjølbroytt, tí tá kunnu øll onkursvegna vera við og kenna seg sum part av hesum spennandi umhvørvinum, sum ítróttur er segði Steinbjørn Jacobsen á samkomuni eftir kappingina. Tað var Barok í Klaksvík, sum var sponsor til FM kappingina fyri staklingar.



*Tað liggur væl fyri hjá Halli*




*Borgarstjórin í Klaksvík, Steinbjørn Jacobsen handaði Klaksvíkar Billardfelag ein tjekk frá kommununi uppá 5000 kr. fyri tað stóra arbeiði og virksemi, sum felagið hevur staðið fyri seinastu árini og ikki minst fyri mongu góðu úrslitini.*